Fríggjadag 27. kl. 11.20



Being Mick Jagger CANAL+
Amerikonsk dokumentarsending um og við Mick Jagger, har megastjørnan greiðir frá sínum mangan balduta, men serliga hendingarika lívi.

Leygardag 28. kl. 18.00



Einaferð var tað ein skógur SVF
Cornelius, sum er ein klókur, gamal grevlingur fortelur djórabørnunum í skóginum um dálkingina, sum hóttir alt lív í ígð ikki hugsa serliga langt, sum dálka so illa. Ein dagin koppar ein tangabilur við lívshættisligum eitri, og mamma eitt av djórabørnunum doyr, og ungin er sjálvur í lívsvanda.

Sunnudag 29. kl. 15.55

Arsenal-Liverpool CANAL+
Jólamánaðurin hevur verið alt annað enn stuttligur hjá teimum báðu ensku risunum, sum hava sæð skaran av kappingarneytum komið alsamt nærri og enntá framvið. Tí hevur hvørgin parturin ráð at missa nakað sum helst, nú seinasti stórdysturin í hesum árinum er á skránni.

Mánadag 30. kl. 13.05

Dr. Doolittle 2 CANAL+ GUL
Altíð stuttligi Eddie Murphy hevur aftur leiklutin sum Djóragóði. Djóralæknin, sum ikki bert er góður við kundar sínar, men sum eisini skilir tað, sum tey siga.

Týsdag 31. kl. 17.30

Øll vit í Dundurdali SVF
Svenskur barnafilmur eftir søgu hjá Astrid Lindgreen. Hetta er søgan um børnini í Dundurdali, og alt tað, tey uppliva summar og vetur, vár og heyst.

Mikudag 1. kl. 11.40

Ivanhoe 3
Hann verður róptur Ivanhoe. Tann arvaleysi. Klassiska skaldsøgan hjá Walter Scott um enska riddaran. Strið hansara móti John Prinsi og tráðan hansara eftir teirr vøkru Rebeccu.

Hósdag 2. kl. 16.45



Smash hits 2002 TV2 ZULU
Sjeynda árið á rað heiðra breter altjóða tónleikarum, sum á sín hátt hava sett dám á farna árið. Og røðin av stjørnunøvum,l sum koma til London at taka lut er imponerandi long.

Leygardag 28. kl. 19.05

Ítrótturin 2002 ÚF
Ljós verður varpað á minniligastu ítróttartilburðirnar í árinum, sum fer. Glæsiligastu sigrarnir verða endurvarpaðir og umrøddir. Vinnararnir eru í miðdeplinum hesa løtuna. Nógv ítróttafólk eru gestir í leikhøllini hetta kvøldið.

Sunnudag 29. kl. 19.00

Kulturin in mente ÚF
Hvussu royndist mentanin í 2002? Mentanarvirksemið í ár verður lagt undir sjóneyku. Tónleikarar og tónleikabólkar, sum hava verið nógv frammi í ár, fara at spæla. Rithøvundar fara at lesa úr egnum verkum, og sjónleikarar fara ætlandi at trína pallin.

Fríggjadag 27. kl. 14.40



Superman DR2
Serfrøðingurin Jor-El finnur út av, at planet hansara, Krypton, er um at eksplodera, og tí sendir hann son sin aðra staðni at vaksa upp. Á jørðini veksur Clark Kent upp sum ein vanligur drongur, men hann kemur tó eftir, at hann hevur serlig evni.

Leygardag 28. kl. 18.30

Temalørdag: Charles Chaplin DR2
Hann var helst størsti skemtarin í filmssøguni. Jóladag vóru 25 ár liðin, síðani Charles Chaplin doyði, og DR fer her at senda eina dokumentarsending um lítla vagabondin í smala jakkanum, víðu buksunum og alt ov stóru skónum.

Sunnudag 29. kl. 18.00



Fyrstu 100 dagarnir hjá Laudrup 3
Carsten Werge og Ole Petersen hava fylgt við, hvussu Michael Laudrup hevur staðið seg fyrstu 100 dagarnar í nýggja venjarasessinum í Brøndby. Millum annað verður fylgt við venjingum og dystum, men eisini verður roynt at fara meira afturum donsku fótbóltslegenduna.

Mánadag 30. kl. 17.00



Morten DR1
Eina nátt, sum Mortan hyggur at stjørnum, hittir hann ein granna, sum hann ongan tíð áður hevur sæð. Nevnliga eina flogmús. Hetta heldur hann vera ótrúligt, og sjálvur vil hann nú eisini duga at flúgva.

Mánadag 31. kl. 20.00

Harry CANAL+ GUL
Tá Michels er og ferðast úti á bygd í Fraklandi, kemur gamli vinur hansara Harry brádliga upp í leikin. Hann er so bergtikin av hegninum hjá Michel at skriva, at hann vil gera alt, til tess at fáa hann undir hetta yrkið aftur.

Mikudag 1. kl. 19.25

Undan Væðingini SVF
Føroyskt Bátasmíð 1:2
Í 1987 gjørdi SVF eina sending í tveimum pørtum, har Finnbogi Ískason hugdi at, meðan Simun Jóhan Wolles smíðaði bát. Og hetta aldargamla handverk hevur nú fingið sína egnu doktararitgerð, tí nýttu vit høvið at fara undir væðingina eftir sendingunum.

Hósdag 2. kl. 20.00



IT 1
Hvørt 30. ár verður lítli býurin Derry í Maina raktur av »it«. Tá tann manipulerandi men at siggja til stuttliga klovnin Pennywise vaknar úr dvala, er talan um somikið stóra styrki, at menniskjan hevur ilt við at fata tað.

Mikudag 1. kl. 10.30

Strauss, Stolz og aðrir ÚF
Nýggjárskonsert úr Wien? - Nei, ikki rættiliga, men nakað, sum er henni átøkt, soleiðis at skilja, at tónleikurin, sum ljómar henda hálva tíman, er eftir Strauss`arnar, Joseph Lanner og aðrar, og orkestrið er Wiener Symhoniker.

Mikudag 1. kl. 14.15

Eitt nýtt ár ÚF
Eru Føroyar longu eitt oljuland? Europa er nú næstan alt sameint í ES - hvar eru Føroyar? Standa okkara útbúgvingar mát við grannarnar?

Hesar og aðrar aktuellar spurningar nema vit við í framtíðarsendingini nýggjársdag.

Fríggjadag 27. kl. 22.05

David Copperfield 2:2 SVF
Tann vaksni David Copperfield er so smátt farin at vinna sær pengar sum rithøvundur. Hann giftist við Doru, og tað fegnast vinkonan Agnes ikki um. Vinmaðurin Steerforth fær rumbul í, tá hann rýmir við vinkonu David, Emily, sum er trúlovað, og samstundis er Micawber komin í neyð av tagnarskylduni, nú hann arbeiðir fyri Uriah Heep.

Leygardag 28. kl. 22.50

Nothing Hill SVF
– br./amr. Kærleiksfilmur
William Thacker hevur ein handil við ferðafrásagnarbókum í Londonbýarpartinum Notting Hill. Ikki er stórur gravgangur eftir bókunum. Men ein dagin kemur Hollywoodstjørnan Anna Scott inn í handilin at keypa eina bók, og eftir hetta hittast tey bæði fleiri ferðirnar av tilvild. Tað rennur saman teirra millum, men tað er ikki bara gaman.

Sunnudag 29. kl. 22.05



Bíblian – Samson og Dalila 2:2 SVF
Samson vil hava hevnd, men gessurin verður hansara lagna. Hanun kongur sendir ta eiggiligu Dalilu út fyri at tøla Samson, freista loynidómin um styrki hansara frá honum, og síðan knúsa hann og alt hansara fólk.

Mánadag 30. kl. 19.00

Ringside: Tyson-Lewis 3
8. juni hittust tveir av risunum í altjóða nevaleiki. Í einum veldugum dysti mátti Mike Tyosn fara út sum tapari, og spurningurin er helst, um hetta ikki var endin á ikki altíð líka glæsiligu yrkisleið hansara í altjóða nevaleiki.

Mánadag 31. kl. 21.20

Landsbylægen DR1
Winther-lækni hevur nóg mikið at takast við í Fjorslev. Húshjálpin, Anne-Metta gongur í giftingartonkum, lítlasystir hennara er upp á vegin, og sjálvur hevur læknin hjartasorg, og alt hetta krevur meira enn ein vanliga góðan lækna.

Mikudag 1. kl. 20.45



Asterix & Obelix SVF
Gandadrykkurin hjá Miraculix er so mikið góður, at fólkini í einari lítlari galliskari bygd megna at verja seg móti rómverska herinum hjá Juliusi Cæsar, og tað er ikki onki. Ráðgevin hjá Cæsari, Psychopatus, hevur eina snildisliga ætlan til tess at basa hesum gallarunum.

Hósdag 2. kl. 20.50

Lívið hjá dvørgum SVF
Sendingin gevur eitt sjáldsamt innlit í lívið hjá tveimum fólkum, sum eru nógv styttri enn onnur. 12 ára gamla Hollie Morrison í Christchurch er født sum dvørgur, hennara lívsdreymur er at verða yrkisdansari. Pápi hennara Ron er eisini dvørgur, men mamman er til longdar sum fólk flest. Sendingin fekk Media Peace Award í Ný Sælandi.

Hósdag 2. kl. 19.00

Tilvera: Trúboðari í Nigeria ÚF
Gestur í útvarpsstovuni er Kaja Lamhauge Babba, sum í mong ár hevur verið trúboðari í Nigeria. Hon er gift nigerianskum erkabiskupi, og eiga tey tríggjar synir. Hon sigur frá einum øðrvísi lívi í hesum fjarskotna landi.

Fríggjadag 27. kl. 22.15



Hard Time 3
Undir eini narko-razzia verður ein av teimum, sum eru undir illgruna, onkursvegna myrdur, og illgruni er um, at tað er ein løgreglurmaður, sum hevur gjørt hetta. Logan McQueen hevur longu fleiri kærur ímóti sær, og líkt er ikki til, at nakar er førur fyri at reinsa hann.

Leygardag 28. kl. 22.55



Ræðslutrilogiin 3
Zuni-dukkan kemur aftur í einari av teimum trimum ræðusøgunum. Fyrst hitta vit tó eina ovurhonds gríska kvinnu, sum drepur mann sín fyri at vinna pengar, og eisini siggja vit eina mammu, sum ger eina pakt við sjálvan devulin.

Sunnudag 29. kl. 22.55



Devulsins barn DR1
Vara teg fyri undrum eru seinastu orìðini hjá mamu Nikki. Stutt eftir fær Niki beri starv, eins og hon hittar ein vakran professara. Stutt eftir keypir hon eina flotta íbúð fyri arv sín, men okkurt er, sum ikki ruggar rætt, og kanska hevði mamman rætt í ti, sum hon segði.

Mánadag 30. kl. 20.25



Trivaligir ungdómar SVF
Í USA eru 10 milliónir børn, sum eru so skelkandi feit, at fitin við vissu fer at stytta teimum um lívið. Sendingin snýr seg um, hví børnini eru so feit og hvussu framtíðarútlitini eru hjá einum heilum ættarliði av børnum og ungum. Sendingin fylgir fleiri amerikonskum og bretskum húskjum í teirra næstan

Mánadag 31. kl. 22.00



Hatta var hatta SVF
Mr. Bean roynir sum frægast at skipa fyri nýggjárshaldi, sum onki kostar. Eisini verða onnur kend andlit at síggja í sendingini, til dømis ein flogskipari.

Mikudag 1. kl. 22.30



Fangaður á marki fíggindans SVF
Heryvirmaðurin Hambleton hevur bara upplivað kríggið handan skriviborðið, tá hann verður skotin niður yvir regnskógin í Vietnam. Staddur í fíggindalandi er hann einsamallur við einari skammbyrsu og einum útvarpstóli, sum gevur honum samband við flogskiparan Bird-Dog.

Hósdag 2. kl. 21.35

Krimitímin: Eitt mál fyri Frost. SVF
Barnard, sum Frost tekur sær av, fær ein ógvusligan deyða og ein skelkaður Frost hevur søkt um at sleppa úr starvinum. Stjóri hansara, Mullett, sum annars ikki heldur so nógv um Frost, fær hann at taka uppsøgnina aftur, og saman við teirri ungu Hazel Wallace fær Frost í uppdrag at kanna málið um ein listasavnara, sum er deyður undir løgnum umstøðum.

ÍTRÓTTUR

3
Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag

CANAL+
Leygardagin kl. 15.55
Premier League-beinleiðis

Sunnudagin kl. 13.55
Premier League: Newcastle-Tottenham

Sunnudagin kl. 15.55
Premier League: Arsenal-Liverpool

Sunnudagin kl. 23.00
NHL: Coloorado-Losa Angeles

Nýggjársdag kl. 13.55
Premier League: Manchester United-Sunderland

Nýggjársdag kl. 19.40
Premier League: Newcastle-Liverpool

dk4
Hesa vikuna
Sigling: Metal Cup 2002

DR1
Leygardagin kl. 19.00
Sport2002, beinleiðis

Sunnudagin kl. 13.00
Hondbóltur, steypafinalur: Viborg-GOG
Ikast Slagelse

Nýggjársdag
Skíðlop WC úr Fra Garmish-Partenkirchen, Týsklandi

EUROSPORT
beinleiðis hesa vikuna
Skíðlop WC úr Engelberg, Schweiz.

Supercross HM úr Anaheim, USA.
Skíðlop WC úr Oberstdorf, Týsklandi

Alpint WC úr Bormio, Italia
Skoytu galla úr Oberstdorf, Týsklandi

Nordic Combined WC úr Oberhof, Týsklandi

ATP Tennis úr Doha, Qatar

TV2 ZULU
Fríggjadag-sunnudag
Badminton: Copenhagen Masters

Sunnudagin kl. 21.00
NFL-beinleiðis